                     E                    E7       A                     E
1:  Mær er sagt um eitt land, á tí Himmalsku strond,
       H                              E
Bíblian um tess dýrd sigur frá.
                                           A                    E
Lívsins sorg, neyð og stríð, ei fylgja mær tá,
            H                       E
heyst og elli ei meira meg ná
.

Kór:    A         Amol       E
Á hitt signaða land, á tí skýnandi strond,
                           Fiss             H
eingin sorg, eingin stormur meg nær.
           E             E7             A            E
eins og brúsandi hav, ljóðar songurin har,
        H                            E
og um Jesus tann songurin er.

2:  Har songurin ljóðar sum brimduni hart,
frá tí blóðkeypta skara Hann vann.
Har við hørpu í hond, á tí skínandi strond,
tá vit náa tað signaða land.

3:  Í tí staði tilreiðar ein búðstaður er,
sum Jesus við blóði mær vann.
Eingin sól, eingin máni í staðnum har er,
tí ljósið er Jesus, Guds lamb.

4:  Ei hitt dálkaða sinn, í tann stað sleppur inn,
men bert tann sum har skrivaður er.
Sum úr trongdunum vann, gjøgnum blóðið sum rann,
inn í staðin, um portrini fer.

Yrkjarin okkum ókendur.
Guðna Ó. Midjord. umsetti úr norskum
uml. 1985.